


*Tey, sum standa aftanfyri bátafestivalin á Toftum, heita á so nógvar báteigarar sum gjørligt um at loysa og at verða við í siglingini leygardagin – eisini, um viðkomandi ikki hava møguleikan at gerast partur av sjálvum stevnutiltøkunum*

# So loysa bátarnir aft

**Í morgin verður ársins fyrsti bátafestivalur, og hesin verður hildin á Toftum. Bátarnir møtast inni í Skálafirði klokkan 12, og ein tíma seinni verður stevnt út eftir fjørðinum, har bátafylgið kemur inn í Oyrahavnina á Toftum klokkan 14**

Vilmund Jacobsen

At sigla við stuttleikabáti og hugna sær saman á bátafestivalum, stevnum og útferðum annars er nakað, sum rættiliga hevur vundið upp á seg í Føroyum seinnu árini. Tað eru eisini fleiri ár síðan, at føroyingar byrjaðu at fara uttanlands at sigla við sínum bátum, eitt nú til Noregs. Norrøna tók bátar og fólk við til Bergens, og soleiðis hava nógvar føroyskar familjur havt frálíkar túrar innan fyri norska skergarðin, har siglt hevur verið millum bygdir.

Tá Oyggjaleikir vóru í Hetlandi fyri nøkrum árum síðan, vóru eisini nógvir føroyskir bátar – størri og smærri – á ferð millum lond. Flestu bátar sigldu bæði niður til Hetlands, har steðgað var í nakrar dagar – og síðan heimaftur til Føroya.

Millum bátarnar, sum vóru á hesi ferð, vóru stórir og flottir glastrevjabátar og heilt niður í áttamannafør. Nógvar familjur nýttu høvi at gera hendan túrin saman, og í øðrum lagi vóru kenningar og vinfólk saman á hesum bátum.

Tað tekur umleið eitt samdøgur at sigla úr Føroyum til Hetlands við 7-8 míla ferð. Hetta er langur vegur hjá børnum í smærri bátum, og tí sigldu kvinnur og børn í summum førum niður til Hetlands við Norrønu. Í nakrar dagar hugnaðu tey sær saman við teimum, sum høvdu siglt niður í bátum, til kvinnur og børn aftur fóru heimaftur við Norrønu, samstundis sum bátarnir loystu aftur í Hetlandi.

## Byrja á Toftum

Eingin ivi er um, at bátasigling er komin fyri at vera, og nú leygardagin verður so ársins fyrsti bátafestivalur, har Toftir er í miðdeplinum.

Bátarnir møtast inni í Skálafirði klokkan 12, og ein tíma seinni verður stevnt út eftir fjørðinum, har bátafylgið kemur inn í Oyrahavnina á Toftum klokkan 14.

Ein hálvan tíma, áðrenn bátarnir stevna inn í Oyrahavnina, byrja harmonikuleikarar at spæla fyrstu løgini við bátahylin.

Vanligt er, tá bátarnir hava lagt til bryggju, at bátsfólkið fær heita suppu og okkurt leskandi, og soleiðis verður helst eisini hesaferð.

Fleiri bátsmanningar binda bátarnar og liggja fyri náttina, eins og bátsfólkið luttekur í teimum tiltøkum, sum eru á festivalinum. Tað eru tó altíð nakrir bátar, sum luttaka í siglingini, men sum kortini ikki gerast partur av sjálvum stevnutiltakinum, tí eitt hvørt annað er á skránni, sum leygardagurin líður.

Tey, sum standa aftanfyri bátafestivalin á Toftum, heita á so nógvar báteigarar sum gjørligt um at loysa og at verða við í siglingini leygardagin – eisini, um viðkomandi ikki hava møguleikan at gerast partur av sjálvum stevnutiltøkunum.



## Ymisk á skránni

Ein skrá er løgd fyri bátafestivalin, har ymiskt er á skránni, bæði fyri børn og vaksin.

Klokkan 15 leygardagin lata hoppiborgir og ymiskt annað upp á festivaløkinum, og har verður eisini tombola.

Pylsuvognur verða opin á økinum, og Navia fer at selja úr einum tjaldi.

Longu klokkan 16 leygardagin verða festivalbúffar seldir, og eftir klokkan 16 verða ymiskt tónleikatiltøk, har eitt ní Niels Midjord og Hallur Joensen fara at syngja og spæla – Niels klokkan 16 og Hallur klokkan 16.30.

Uppboðssøla verður av tekning, og um kvøldið

**»... ein hálvan tíma, áðrenn bátarnir stevna inn í Oyrahavnina, byrja harmonikuleikarar at spæla fyrstu løgini við bátahylin...**